

Ólavsøkukabarettin verður í ár samfelagsrevsandi. Tað lova leikararnir í øllum førum

Mynd: Jens Kr. Vang

# Samfelagsrevsandi ólavsøkukabarett

**Einum nýtist ikki at hava gjørt nakað býtt fyri at gerast offur í ólavsøkukabarettini í ár**

KABARETT
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

– Ólavsøkukabarettin í ár verður samfelagsrevsandi.

Tað siga tríggir av leikarunum, Jóannes Lamhauge, Høgni Reistrup og René Bischoff.

Fyrireikingarnar til ólavsøkukabarettina 2004 koyra nú í fimta geari, og leikararnir hava mestsum sligið búgv niðri í Sjónleikarhúsinum í Niels Finsensgøtu í Havn.

## Nógvur sangur

Í ár eru allir leikararnir nýggir, og tað sama er galdandi fyri orkestrið. Men hóast tað, so hava allir leikararnir spælt sjónleik áður. Bara ikki júst ólavsøkukabarettina.

Leikararnir lova eitt sindur av hvørjum. Millum annað nógvan sang.

– Tað verða parodiir, tónleikur og nógvur sangur. Meira sangur enn vanligt. Millum annað hava vit gjørt eitt kórarragement, siga leikararnir.

Tilfarið verður smíðað burturúr tí, ið hevur gingið fyri seg seinasta árið.

– Tey, sum hava dummað seg, eiga at vera klár at verða hermd eftir, siga teir, men draga so í land aftur.

– Okay, kanska ikki endiliga dummað seg. Ein skal bara hava verið frammi í fjølmiðlunum ella líknandi.

Leikararnir leggja dent á, at tað skal vera okkurt, ið fólk kenna aftur. Tí tað er eitt krav, fólk seta.

– Tað er ein óskrivað regla, at tað, ið verður framført í ólavsøkukabarettini er alment kent. Tilfarið er ikki beinleiðis lokalt, men tað verður eisini okkurt, ið er spildurnýtt, sum vit sjálvi hava funnið uppá.

## Ein bumba

Kabarettleikararnir eru sannførdir um, at talan verður um hart arbeiði fram til frumframførsluna. Ongin ivi um tað. Tí verður nú arbeitt í døgndrift.

– Í løtuni sita vit og smíða sketsjur og royna tær av. Vit geraordiliga nógvar sketsjur, og so sortera vit frá aftaná, greiða teir tríggir frá, og leggja afturat, at Jákup Veyhe hevur verið við til at hjálpa. Hann hevur virkað sum eitt slag av ígongdsetara, men treyðugt so. Hann hevur sum so ikki nakað við sjálva kabarettina at gera.

Sambært spælarunum er tað týdningarmikið ikki at troytta fólk. Og tí skal ein ansa væl eftir.

– Men vit vænta, at hetta verður ein bumba, og vit gleða okkum nógv til frumframførsluna, siga teir tríggir, Jóannes Lamhauge, Høgni Reistrup og René Bischoff at enda.

Frumframførslan verður í Sjónleikarhúsinum mánadagin 26. juli.

## Ólavsøkukabarettin 2004

Leikarar:
Jóannes Lamhauge
Høgni Reistrup
René Bischoff
Ann Chanett Danielsen
Loyniligur leikari


















